# Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

**Evni:** Erla Kongsdóttir

**Spurningar:**

1. Er Erla Kongsdóttir eitt nøktandi avloysaraskip hjá Strandfaraskipum Landsins?
2. Hvørjum standi er skipið í?
3. Hvussu nógv verður skipið brúkt?

**Viðmerkingar:**

Fyri nøkrum árum síðani bleiv strandfaraskipið Erla Kongsdóttir bygt at nýta sum avloysaraskip hjá Strandfaraskipum Landsins. Ætlanin var serliga at nýta skipið á miðleiðunum so sum Nólsoyar-, Kalsoyar- og Hestleiðunum, men skipið segðist eisini kunna nýtast á ytru leiðunum so sum Fugloy, Svínoy og Skúvoy, tá ið veður og vindur vóru til vildar. Erla Kongsdóttir skuldi vera avloysaraskipið, sum Strandfaraskip Landsins í langa tíð hevði manglað.

Men lítið hevur verið at hoyrt og sæð til, at skipið hevur verið í sigling ta seinastu tíðina. Ein orsøk kann vera, at tørvur ikki hevur verið á avloysaraskipi, men tað hevur eisini ljóðað, at skipið hevur havt tekniskar trupulleikar.

Tí verður hesin spurningurin settur.

**Á Løgtingi, 27. februar 2024**

Helgi Abrahamsen